# Hoyrikanning/screening av pinkubørnum á Oyrna-Nasa-Hálsdeildini

## Hví kanna hoyrnina hjá pinkubørnum?

Fyri barnið kann sjálvt ein lítil hoyrimissur fáa stórar avleiðingar, tí barnið kann missa mong ljóð, sum eru við til at geva barninum fjølbroyttari fatan av umhvørvinum. Um hoyrimissurin verður funnin tíðliga, eru góð útlit til at bøta um hetta, við millum annað hoyritóli og stimbran av hoyrisentrunum í heilanum. Jú fyrr hoyrisentrini verða stimbraði, tess betri møguleikar hevur eitt barn við niðursettari hoyrn at hoyra og málsliga búnast.

## Hvussu verður hoyrikanningin gjørd?

Kanningin kann best gerast tá barnið er friðarligt ella svevur, tí tað er týdningarmikið, at tað er friðarligt í rúminum, meðan kanningin verður gjørd. Kanningin varir umleið 5 -10 min. Frægast er at kanningin verður gjørd frá 3. degnum, men um barnið fer heim áðrenn, kann barnið fáa gjørt hoyriscreeningina áðrenn.

Barnið fær ein bleytan oyrapropp í oyrað, har klikkljóð verða send inn í oyragongina. Tá innara oyra/hoyrisnigilin móttekur klikkljóðið, fer oyrað at gera eitt ekko, sum verður skrásett av eini lítlari teldu. Hetta er ein sokallað OAE-kanning (Otoakustiskar emissiónir).

Um kanningin ikki gongur ígjøgnum, merkir tað ikki altíð, at barnið hevur niðursetta hoyrn. Tað kunnu vera aðrar orsøkir til hetta. Aloftast kann tað vera, at barnið er ófriðarligt, ella barnið kann hava fosturfeitt/fosturvatn í oyrunum, sum er púra normalt fyri nýføðingar og sum fer burtur av sær sjálvum

Kanningin verður gjørd eftir avtalu á Oyrna-Nasa-Hálsdeildini, B4.

**Foreldur kunnu ringja á tlf: 304622 ella 304512 millum kl. 10:00 - 12:00**
**Minst til at upplýsa P-talið hjá barninum**



Okt. 2025

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo